Um onkur reypar á Facebook, er so talan um FACE-reyp?

**Maður, 43 ár**

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein

# Miðlamjørr



*Ein vindmylla í Føroyum gevur 1,8 ferðir so nógva orku sum ein mylla aðrastaðni.*

Kári Mortensen um grøna orku í Føroyum (Sosialurin)



*Eigarin segði við meg, at eg skuldi ikki halda meg vera nakað. So svaraði eg, at tað var ikki nakað, eg helt, men nakað, eg vitsti.*

Presturin Johannes Møllehave fortelur um pínligan atburð á hotelli, har hann gjørdist fullur (Ekstrablaðið)





Visti ikki av, at so nógv festlig, kreativt, fjálgt og lívgandi kundi pakkast niður í eitt Zareptavikuskifti. Eg eri hervið officelt Ebenezer-fjeppari.

**Kvinna, 40 ár**

*Nú er eitt gylt høvi at byggja okkara Skeiva Torn í Pisa ella Operahús í Sydney.*

Løgtingsmaðurin Jóannes Eidesgaard um Saltsilo-projektið (Sosialurin)

*Yvirbjóðingin av spælarum má steðgast, tí hon koyrir feløgini út í fíggjarligt óført.*

FSF-forsetin Christian Andreasen mælir til at seta fótbóltsmarknaðarkreftirnar úr gildi (Fótfimi)

*Kvinnan er mest avmyndaða evnið í listasøguni – nógv meira enn tjóðarhetjur, sum onkursvegna allar eru menn.*

Kim Simonsen, mag. art, um list (Dimma)

*Tað er ein synd at vera troyttur*

Kate Moss um arbeiðið í mótaheiminum





Fyrsta reality sendingin í Føroyum nevndist Tórshavn Radio.

**Maður, 45 ár**

Nú er nátt og um eina løtu doyggi eg og spurningurin er hvørju megin eg vakni í morgin, í tí formleysa landi sum andi, ella til ein heilt vanligan mánadag. Bæði eru líka góð. Hetta má vera tað filosofiin kallar dagliga deyðan.

**Maður, 53 ár**